## Tjóðveldi: EIN vegur úr bølaniðuni

- Vit hava góðar møguleikar sum tjóð at venda teirri búskaparkreppu og kreppu í okkara tilfeingisvinnu, sum fyrst av øllum er skapt av politiskum skeivum avgerðum. Men so er neyðugt at vit sleppa framat, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi. Boðskapurin hjá Høgna Hoydal var ikki til at misskilja: - Tað er bølaniða í landsins stjórn, men tað er morgun í Føroyum. Nógvar frælsiskreftir og skapandi kreftir eru í landinum og sum ein margbroytiligur heimur letur upp ræsur fyri. Hetta krevur, at flokkurin tekur ábyrgd uppá seg. - Veruligar broytingar í einum samfelag kunnu henda, tá bæði innanhýsis trýst og uttanhýsis umstøður virka saman við kravi um atgerð og umstilling. Tá standa vit í einum sonevndum "søguligum gloppi", har tað er sera avgerandi, um vit megna at taka røttu avgerðirnar, segði tjóðveldisformaðurin. Við støði í kenda sanginum "Morgun" hjá vestmenninginum, Martini Joensen vísti Høgni hoydal á, at tað er morgun í Føroyum, tí tað nú lýsir fyri einum politiskum vaktarskifti og einum politiskum siðaskifti. Samstundis er tað niðurfaringartíð hjá tí gamla heimastýrisliga valdspolitikkinum hjá einstaklingum og flokkum, sum bara vendir inneftir og sum aftur og aftur leiðir okkum út í kreppur, forðar fyri broytingum og druknar í ábyrgdarundanstøkking og nalvaskoðan. - Leingi hevur verið songartíð hjá sitandi stjórnarsamgongu, og alt bendir tíverri á, at um so allir heimsins hanar gala, so fæst hon ikki upp ella út í vindin, segði Høgni Hoydal, og hann legði aftrat: - Okkara størsta avbjóðing er, at vit ikki fara til songar saman við teimum ella draga somu gardinur fyri okkara gluggar, sum politiska leiðsluloysi elvir til.

# Liva í vónini

**- Eg havi møtt fólki, sum vóru heilt vís í, at vit høvdu fingið sjálvstýri, áðrenn tey fóru í grøvina, sigur 63 ára gamli Árni Brattaberg úr Vági. Um vikuskiftið var hann enn einaferð á flokstingi hjá Tjóðveldi, hesaferð í Vestmanna.**

FLOKSTING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Vestmanna:** - Tað er trupult at svara uppá, nær tað verður at vit fáa loysingina. Men tað er vón fyri framman, slær hann fast.

Flokstingið um vikuskiftið vísti, at tað framvegis eru tey sum fylkjast um tjóðveldishugsjónina. Eisini í Suðuroy merkist ein nýggjur eldhugi fyri hesum.

- Tað eru nógv nýggj fólk komin framat í flokkinum tey seinnu árini. Og tá eiga tað at verða skaptir nýggir møguleikar, slær hann fast.

Á fundinum var eisini ein tilkomin maður, sum livir í vónini og framvegis trýr, at hann sleppur at uppliva dagin, tá Føroyar gerast sjálvstøðugar.

Árni Brattaberg plagdi onkutíð at taka orðið á slíkum flokstingum, ikki minst í síni táverandi støðu sum formaður í Suðuroyar Tjóðveldisfelagi.

- Nú eru dugnalig fólk komin framat. Jú, eg haldi, at vit ganga ímóti eini bjartari framtíð, sigur hann brosandi.

### Sjálvfylgiligt sjálvstýri

Á flokstinginum um vikuskiftið vóru fólk úr øllum valdømum, sum tað áður kallaðist, møtt. Og her var møguleiki at gera vart við síni sjónarmið, eisini við lokalum atliti.

Árni Brattaberg hevur verið á slíkum flokstingum mangan áður. Her hittir hann fólk úr øllum landinum, og her hittir hann ikki minst fólk, ið hava somu politisku hugsjón sum hann.

Hjá honum, sum hjá so mongum øðrum sum vóru í Vestmanna um vikuskiftið, er tað helst so, sum mangan hevur verið tikið til, at "í hjørtum okkara býr frælsi".

Árni lýsir hetta hugtakið við egnum orðum:

- Tá man altíð hevur havt eitt arbeiði sum sjálvstøðugur vinnurekandi, so er tað í míni verð ein sjálvfylgja, at tú eisini hevur eitt sjálvstøðugt land.

- Ja, hetta merkir stutt sagt, at ein má klára seg sjálvan. Í míni verð er eingin ivi um tað, slær hann fast.

Frammanundan hesum flokstinginum hevur hann luttikið á út ímóti 20 flokstingum.

### Fullveldissamgongan

Í føroyska samfelagnum er tað so, at áhugin fyri politiskum arbeiði innnanfloks hevur verið bæði upp og niður.

- Eg havi verið á flokstingum við fáum fólkum. Eg havi eisini verið á flokstingum, har sera nógv fólk var og har vit høvdu sera lívlig orðaskifti, greiðir hann frá.

Serliga væl minnist hann flokstingið, sum varð hildið í 1998, í samband við løgtingsvalið hetta árið. Hetta var eitt sera týðandi ár hjá Tjóðveldisflokkinum, sum hann kallaðist tá, eins og flokkurin fekk eitt gott valúrslit.

Eftir valið kom haraftrat eitt systemskifti innan føroyskan politikk, tá tann

